

Johan Dahl, landsstýrismaður,Rúni M. Hansen, stjóri í Statoil og Petur Joensen, stjóri á Jarðfeingi. Mynd Jan Müller

# Johan Dahl: West Hercules nýbrot í føroyskari vinnu

Deil:

**Jan Müller**

23.09.2014 - 18:40

Oljan.fo

Bert fáar dagar áðrenn boripallurin Western Hercules setir kós av Skálafjørðinum aftur til havs – hesaferð til New Foundlands – vitjaði landsstýrismaðurin í vinnu- og oljumálum, Johan Dahl umborð á pallinum. Har hevði hann saman við stjóranum í Statoil, Rúna M. Hansen og stjóranum á Jarðfeingi høvi til at síggja pallin og nakað av tí arbeiði, sum føroyskir handverkarar hava staðið fyrii góðan mánað.

Tað var 19. august, at West Hercules kom á Skálafjørðin at fáa umvælingar gjørdar, áðrenn hann skal víðari til Kanada at bora fyri Statoil .

“Eg eri ómetaliga glaður um, at tað hevur eydnast Statoil saman við professionellum føroyskum fyritøkum at fáa pallin til Føroyar at verða umvældan. Hetta er eitt vegamót í føroyskari vinnu og ein sera kærkomin hending, Hetta verður vónandi ikki seinastu ferð heldur, at vit síggja ein oljupall í føroyskum umhvørvi, antin tað er á landgrunninum ella inni á einum av okkara firðum.”

Johan Dahl sigur, at tað var spell, at eingin olja var funnin á hesum sinni, Hinvegin kunnu vit bara fegnast um, at leitingin hevur sett so nógvar ringar í sjógvin, at fleiri føroyskar fyritøkur, hava kunnað latið vørur og tnastur bæði meðan borað er og aftaná, har umvælingar verða gjørdar av okkara frægu handverkarum á PAM og øðrum fyritøkum. Landsstýrismaðurin heldur hendingina við West Hercules á Skálafjørðinum verða einki minni enn eitt nýbrot í føroyskari vinnu.

Rúni M. Hansen hjá Statoil, sum eisini hevði høvi til at heilsa uppá fleiri av Statoilfólkunum, ið hava staðið fyri boringunum í summar, sigur við Oljan.fo, at tað er hugaligt at síggja, at tað hevur gingið so væl at umvæla pallin í Føroyum. Hann vónar, at henda serstaka hendingin kann stuðla undir arbeiðið og royndirnar hjá føroyskum fyritøkum, ið veita vørur og tænastur til altjóða oljuvinnuna.

Eisini Petur Joensen, stjóri á Jarðfeingi, sum vitjaði umborð á West Hercules fegnast um møguleikan hjá føroyingum at umvæla pallin. Hann heldur hetta er eitt dømi um, at vit hava fólk við vitan og royndum, sum megna at arbeiða í oljuvinnuni, og sær hann fram til, at henda sera positiva gongdin innan føroyska vinnur fer at halda fram og mennast.